


| V | N | E | S |
|---|---|---|---|
| Plackett | Dam | Pownall | Lassaberg |
| - | 1♣ | pass | 1♥ |
| pass | 1♠ 1) | pass | 4ut 2) |
| pass | 5♣ 3) | pass | 5♦ 4) |
| pass | 6♣ 5) | pass | 6♦ |
| pass | pass | pass | |

1) Ójøvn hond.
2) RKC-1430.
3) 1 ella 4 ess.
4) Spyr eftir ♠Q.
5) Lovar ♠Q og ♣K. Noktar ♥K.

Fyrsti dysturin í EM í Opatija var móti Wales, og fekk føroyska liðið eina góða byrjan í kappingini við at vinna dystin 16,09-3,91 (38-12 IMP, úrslitið svarar til tað, vit eftir gamla stiganum kallaðu 21-9).

Her síggja vit, hvussu Árni Dam og Símin Lassaberg í afturlatna rúminum komu í lítlaslemm. Í opna rúminum komu walisar einans í útgang.

Útspælið var ♦A, og Eystur spældi enn ein rútara, sum Árni tók við konginum. Hann spældi síðan kleyvara til essið, trumfaði ein kleyvara, tók ♠A, spældi ♠J til frúnna og trumfaði enn ein kleyvara. Kleyvaraliturin var nú góðspældur. Eftir var bara at taka ♥A, trumfa seg inn á hondina og taka tann seinasta trumfin við ♠10. Kleyvaraliturin tók restina av stikkunum.

Hesin slemmurin kravdi, at kleyvarin ikki sat verri enn 4-2, og trumfurin skuldi sita 3-2. Tá hetta eydnaðist, vunnu Føroyar 11 IMP fyri spælið.